# Pakka saltfisk í Sørvági



Høvuðsrávøran hjá Vestís Seafood er toskur og upsi, men tey hava eisini flakt og saltað smáar nøgdir av brosmu

**Vestís Seafood arbeiðir í tøttum samstarvi við Norðís Seafood á Eiði og saltfiskavirkið, Sammut, í Klaksvík**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

**Sørvágur:** Tey, sum arbeiða á lítla saltfiskavirkinum, Vestís Seafood í Sørvági, eru ikki arbeiðsleys hesar fyrstu dagarnar í nýggja árinum.

Poli Hansen, virkisleiðari, sigur, at nógv var at gera uppundir høgtíðina, og tað er hesin fiskurin, sum nú verður pakkaður.

### Alt verður flakt

Á Vestís arbeiða 11 fólk við virkisleiðaranum, 5 mannfólk og 6 konufólk. Virkið hevur 3-4 mánaðir á baki, og nógv hevur verið at gjørt í hesum tíðarskeiði.

– Vit hava eina flekimaskinu og eina maskinu til flak, men alt, sum higartil hevur verið virkað, verður flakt.

Poli sigur, at høvuðsrávøran er toskur og upsi, men tey hava eisini flakt og saltað smáar nøgdir av brosmu.

Meginparturin av fiskinum, sum virkaður verður á Vestís Seafood, verður keyptur á uppboðssølu.

### Samstarv við Eiði og Klaksvík

Tað eru Vesturvón og Maru við Jóhan Páll Joensen og Jóhan David Joensen, sum standa aftan fyri hetta virksemi í Sørvági. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við Norðís Seafood á Eiði og saltfiskavirkið, Sammut, í Klaksvík, sum somu menn eiga og reka.

Skrivstovan hjá Vestís Seafood er á Eiði.

Poli Hansen, sum hevur verið við í Sørvági síðan byrjanina fyrr í heyst, starvaðist í 5 ár hjá Vaðhorn á Strondum. So, hann veit hvat tað er at fáast við saltfisk.

## Mostir Charley fer út at ferðast



**Hon skal upplivast í Eydnuni á Oyrarbakka og í Sjónleikarhúsinum í Havn**

SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Komandi vikuskifti fáa onnur enn norðingar møguleikan at síggja vælumtókta skemtileikin, Mostir Charley, tí tá fer Klaksvíkar Sjónleikarafelag at ferðast við leikinum.

Mostir Charley hevur verið sýndur í Klaksvík 19 ferðir og hevur leikurin verið sera væl vitjaður, umleið 1500 fólk hava verið í Atlantis og flent at mostrini. Ummælini hava verið góð, og fólk hava verið væl nøgd.

Nú vera tað fólk í Sundalagnum og í Eysturoynni, sum fáa møguleikan at síggja mostrina, tí fríggjadagin, leygardagin og sunnudagin verður Mostir Charley í Eydnuni á Oyrarbakka.

Annað vikuskifti verða tað so fólk í høvuðsstaðnum og har um vegir, ið fáa møguleikan, tí tá verður leikurin framførdur í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Í stuttum snýr leikurin seg um korini hjá ungari ást í einum strongum moralskum umhvørvi. Hvørji eru ráðini til at taka, tá ið tað ikki sømir seg ungum studentum at fara á fund við ungar gentur, uttan at eitt vaksið konufólk er hjá. So nú eru góð ráð dýr, meiri skal ikki avdúkast her.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at klaksvíkingar framføra henda vælumtókta leik, ið Brandon Thomas skrivaði í 1892 og verður mettur, sum ein hin besti skemtileikur í heiminum. Hinar framførslurnar vóru ávíkavist í 1913 og í 1957.

Við í Mostrini eru 11 leikarar, leikstjórnað hevur Jákup Veyhe og Andrias Justesen hevur týtt leikin.

Polarhav og Stjørnan:

# Hampiliga góð søla í Hanstholm



Polarhav og Stjørnan vóru einsamallir á marknaðinum í Hanstholm við upsa mánamorgunin

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Mánadagin, áðrenn Sosialurin fór til prentingar, bar tíverri ikki til at fáa ítøkiliga at vita, hvussu sølan hjá Polarhavi og Stjørnuni hevði verið í Hanstholm.

Vit høvdu Tummas Justinussen í telefonini mánamorgunin, men tá hevði hann ikki fingið endaligu tølini. Tey skuldi hann ikki fáa fyrr enn eftir døgurða hendan dagin.

– Men vit vita tó so mikið, at sølan hevur verið hampiliga góð, sigur hann.

Polarhav og Stjørnan fóru nevniliga útaftur longu, 28. desember og gjørdu ein roktúr; teir fingu 340.000 pund av upsa í fýra dagar!

### Einsamallir á marknaðinum

Tummas vísir á, at ein skotskur trolari og tveir norskir, sum skuldu landa í Noregi fríggjadagin, eisini høvdu boðað frá, at teir fóru at senda upsa á danska marknaðin, men sum skilst, var hesin fiskurin ikki frammi í morgun, tá ið veiðan hjá Polarhavi og Stjørnuni varð seld.

– So vit vóru einsamallir við upsa í morgun, og tað var heppið fyri søluna hjá okkara trolarum, sigur Tummas Justinussen.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gjørdu 70 ára føðingardagin so hugnaligan.

Tøkk fyri vitjan og gávur, blómur og telegramm.

Gott nýggjár øll somul.

**Thor Jacobsen**



Vágatunnilin:

# Eins trygt og á vegnum

**Arbeiðsbólkurin, sum arbeiðir við tilbúgvingarætlanini fyri trygdini í undirsjóvartunnlinum, hevur orðað seg soleiðis: "Trygdin móti persónsskaða skal ikki vera verri pr. km. tunnil enn pr. km. veg"**

TRYGD OG TUNNLAR
*Ingrid Bjarnastein*

Trygdarviðurskiftini í undirsjóvartunnlinum byggja á tvey stig. Tað fyrra er útgerð og tað seinna er ein tilbúgvingarætlan, sum er ein avtala millum avvarðandi partar av tunnlinum. Útgerðin, sum verður í tunnlinum, er í samsvari við norskt tunnilstrygdarstøði.

Í mótsetning til teir vanligu tunnlarnar, kemur undirsjóvartunnilin at hava eldsløkkjarar. Fyri hvørjar 250 metrar verður ein eldsløkkjari, sum eisini hevur beinleiðis samband við alarmsentralin. Hetta vil siga, at um eldsløkkjarin verður tikin av, er ein kontakt, sum sigur alarmsentralinum frá, hvar í tunnlinum eldsløkkjarin varð tikin burtur. Fyri hvørjar 500 metrar verður ein neyðtelefon, sum eisini hevur beinleiðis samband við alarmsentralin. Tá ringt verður frá eini neyðtelefon, sær alarmsentralurin beinanvegin, hvar í tunnlinum tú ert staddur. Afturat hesum, so eru vifturnar í dimensioneraðar á tann hátt, at tær kunnu blása roykin burtur, um til dømis eldur skuldi komið í. Hetta ger tað so møguligt hjá sløkkiliðsmonnum og øðrum at koma til hjálpar. Í neyðstøðum kann alarmsentralurin, við sjálvvirkandi bummum, steingja tunnilin soleiðis, at fleiri akfør ikki koma upp í óhappið.



Dávid Reinert Hansen, stjóri í Vágatunnilin p/f

### Tilbúgvingarætlan

Vágatunnlin hevur saman við Føroya Landsfúta, Landsverkfrøðinginum, Kvívíkar kommunu og Sandavágskommunu skipað fyri, at ein tilbúgvingarætlan verður gjørd fyri vágatunnilin; hetta fyri at royna at fyribyrgja og avmarka skaða á fólk, ognir og umhvørvi, skuldi eitt óhapp komið fyri í tunnlinum.

– Í sambandi við tilbúgvingarætlanina er settur ein stýrisbólkur, sum so hevur sett ein arbeiðsbólk, greiðir Dávid Reinert Hansen, stjóri í Vágatunnlinum p/f frá.

– Arbeiðsbólkurin skal fyriskipa skal millum annað kanna, hvørji óhapp kunnu koma fyri, og hvussu ofta tey kunnu væntast, til dømis, eldur, vanlukkur og uppsteðgaði akfør.

Fyriskipast skal, hvussu ein bjarging skal fara fram, og hvat løgregla, sløkkilið, sjúkraflutningstænasta, vegamyndugleiki og tunnilseigari skulu gera, tá ið óhapp eru. Við í tilbúgvingarætlanini eru eisini brunaumsjónarmenninir frá kommununum báðu megin við, og eisini sýslumenninir.

# Radiogrundaða neyð- og trygdartænastan á havinum

Landstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm og danski ministarin innan vísund, tøkni og menning, Helge Sander, undirskriva týsdagin 8. januar 2002 avtalu um yvirtøku av radiogrundaðu neyð- og trygdartænastuni á havinum (Tórshavn Radio).

Føroya Tele røkir uppgávuna vegna Tele Danmark, og fær endurrindað útreiðslurnar fyri tænastuna frá Tele Danmark, sum eru góðar seks milliónir krónur árliga. Tænastan húasast á Telegrafstøðini undir heitinum Thorshavn Radio, og er hon – eins og í Danmark – ein samansjóðaður partur av strandaradiotænastuni. Á telegrafstøðini starvast fólk, sum hava neyðugan førleika, sum tænastan krevur sambært altjóða ásetingum til at røkja uppgávurnar.

Tænastan er av stórum týdningi fyri trygdina hjá manningini á bátum og skipum í føroyskum havøki.

Føroya Tele fer framhaldandi, eftir yvirtøkuna, at útynna tænastuna, tó við tí grundleggjandi broyting, at Føroya Tele verður álagt rakstrarábyrgdina av tænastuni yvirfyri landsstýrinum, og at føroyskir myndugleikar hava lóggávu- og myndugleikaheimildina og ábyrgdina av tænastuni. Føroya Tele fær endurgoldið útreiðslurnar í sambandi við tænastuni og er á fíggjarlógini 2002 lagt upp fyri hesum.

1. januar 2002 fekk undirskrivaða yvirtøkuavtalan millum danska KT- og granskingarmálaráðharran Birthe Weiss og landstýrismannin Bjarna Djurholm um radiofjarskifti gildi. Við einari yvirtøku av radiogrundaðu neyð- og trygdartænastuni á havinum eru øll øki innan fjarskifti yvirtikin. Avtalan fær gildið 1. februar 2002.





ÁRSINS BILUR 2002

Nýggi Peugeot 307. Í so heiðraður

Fyrst heiðraða øll donsku motorbløðini tann nýggja Peugeot 307 sum ársins bilur 2002 í Danmark. Og sum um tað ikki var nóg mikið. Nú hevur hann eisini vunnið heitið sum Ársins bilur 2002 í Europa.

Vit eru errin av báðum heitunum, og samstundis virðismeta vit tað nógv, at tann nýggi 307 hevur koyrt beint inn í hjørtuni á dønum. Peugeot 307 er nevniliga longu tann mest keypti bilurin í sínum flokki.

Komið sjálvi og upplivað tað dynamiska 307 sniðið, teir eminentu koyrieginleikarnar og høga støði á komfort- og trygdarútgerðini.

Tað verður ikki betur í flokkinum. Millum annað eru 6 airbags standard útgerð í øllum sniðum og ein kabina úr avbera góðum tilfari tilevnað út í minstu lutir.

Vit gleða okkum at vísa tykkum nógvu 307 bilarnar, so tit sjálvi kunnu royna ein bil, sum ikki bara er í so umhugsaður - men eisini í so heiðraður við ikki minni enn tveimum viðurkenningum.

Peugeot 307 XR 1,6: 159.850.- Peugeot 307 SE 2,0: 194.850.-
Peugeot 307 XS 2,0: 176.850.- Peugeot 307 HDI 2,0: 181.850.-

P/F Meinhardt Arge
Tel 34 54 00 · www.bilarge.fo

307 PEUGEOT